# HOT



## Gummiskógvar á G!

Gummiskógvar á G! er feitt og praktiskt – bygdasligt upp á tann kula mátan



## Gaffatape er loysnin

Gaffatape er loysnin upp á so at siga allar trupulleikar, ið stinga seg upp á tjaldingarøkinum



## Sauna á sandinum

At hava ein sauna er hot – bæði so og so



## Ein endurreistur G!-festivalur

Herligt at festivalurin við feita stemninginum, góða tónleikinum og góða veðrinum aftur stóð í fagrasta blóma



## Uppruddingarfólk

Hóast tjaldingarøkið ikki sá soleiðis út sunnudagin, gingu fólk faktisk allan festivalin á tamb og ruddaðu millum tjøldini. Tað gjørdi mun!



## Feitir básar

Í mun til aðrar føroyskar festivalar, hevur G!-festivalurin þeiri feitar básar, ið selja annað enn pilsur og candyboss






## Undirlig tjaldingarskipan

Skipanin – ella mangul upp á tað sama – av tjaldingarøkinum mikukvøldið, tóktist heilt merkverdig. Tey, sum stóðu fremst í køini til økið, sluppu ikki at velja sær eitt pláss, men fingu eitt økið álagt frá vaktunum, tá tey komu inn. Hetta varð tíbetur broytt.



## Stóra navnið manglaði

Skráin sjálv var feit og fjølbroytt, men tað stóra navnið manglaði á festivalinum – serliga leygarkvøldið



## Avdottin áðrenn tað byrjaði

Fólk, sum detta av longu áðrenn fyrsta konsertin er byrjað, kundu næstan tað sama spart sær tær góðu túsund krónurnar, festivalurin kostar



## SIC so tíðliga

At seta SIC at spæla áðrenn klokkan er vorðin átta eitt hóskvøld er ógvuliga skeivt. SIC skal spæla í myrkri eisini við Múrin og G!

**Lagt til rættis: Rólant Waag Dam**
**Myndir: Durita Müller Thomsen, Beinta Haraldsen og Álvur Haraldsen**